# Pedagogfelagið fyllir 25



*Jarvin Feilberg Hansen heilsar uppá fyrstu forkvinnuna í felagnum*



*Brandur stuttleikar sær við splashball*



*Nógv gott var at eta uttan fyri barnagarðin í Hósvík*

FØÐINGARDAGUR

*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Fríggjadagin 1. juni fylti Føroya Pedagogfelag 25 ár. Og føðingardagurin varð hildin bæði við móttøku í felagshølunum í Havn og við størri og smærri tiltøkum kring landi.

Til móttøkuna hjá felagnum komu umboð fyri flest øll onnur fakfeløg. Har vóru umboð fyri Læraraskúlan, har pedagogarnir verða útbúnir, og stjórin á Nærverkinum var eisini og vitjaði. Og so vóru bæði núverandi og fyrrverandi limir.

Nakrir barnagarðar og frítíðarskúlar valdu eisini at gera eitt sindur burtur úr degnum. Í Kollafirði var eitt stórt sjórænaratiltak í nýggju ítróttarhøllini, har børn úr øllum barnagørðunum í bygdini framførdu við bæði sangi og dansi. Høllin var full av stoltum mammum, pápum, ommum, og abbum, sum tóku myndir og film og fingu sær kaffi og kaku.

Eisini aðrastaðni í landinum høvdu pedagogar valt at gera nakað serligt burtur úr degnum. Í Gøtu høvdu tey eitt festligt tiltak við klovnum, sangarum, dansandi hundi og professionellum undirhaldara.

Í Klaksvík var frítíðarskúlin, Sornhúsið, farin út í Grøv við børnunum. Børnini høvdu í fjúrtan dagar arbeitt við tema, har genturnar seymaðu klæðir til tær tiltiknu build-a-bear, og drongirnir arbeiddu við Star Wars, har teir telgdu svør og annað. Úti í grøv høvdu tey so framsýning fyri foreldrum og syskjum.

Og í Hósvík høvdu tey eisini eitt stórt tiltak, og Hanna Tøgersen, leiðari á dagstovninum í Hósvík, sigur, at dagurin var sera væl eydnaður.

- Sum verða man eru flestu børn í Hósvík sera upptikin av teirra fótbóltsliðið EB/Streymur, so frøðin var stór tá ið, Ronnie, Hans Pauli og Brian komu inn á økið og vildu bjóða til dyst, tað var serstakliga stuttligt.

- Veðri var av tí allarfagrasta og vit grillaðu pylsir og búffar og fingu salat afturvið.Til seinast bjóðaðu vit innar í bygdarhúsið har Ævintýraferðin varð framførd, vit sungu og flentu.

Nógv er hent hesi 25 árini síðani Føroya Pedagogfelag sá dagsins ljós. Tá felagið varð stovnað, vóru bert á leið 40 limur. Jarvin Feilberg Hansen, formaður í felagnum, sigur at í dag eru tey 1840 limir. Fyri 25 árum síðani vóru bara nakrir fáir barnagarðar í landinum, meðan vit í dag hava barnagarðspláss til so at siga øll børn undir skúlaaldur.

Arbeiðsøki hjá pedagogunum er eisini nógv víðkað hesi árini. Pedagogar arbeiða bæði á dagstovnum, frítíðarskúlum, umlættingarheimum og bústovnum. Harumframt væntar formaðurin í Pedagogfelagnum, at arbeiðsøki fer at vaksa enn meir tey komandi árini. Fyrr í ár var fyrsti pedagognæmingur í praktik á einum eldrasambýli.

Limir felagsins eru bæði útlærd og fólk uttan útbúgving.



*Pedagogprát í hugnaligu felagshúsunum í Tungugøtu*



*Mattias og Helena eru á veg til fótbóltsdyst*